Maskinmeistari | Maskinistur | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar
## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. august 2009. Umsóknarfreistin er 2. juni 2009.**



### Maskinmeistari
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina verður í august 2009 og í januar 2010.

### Maskinistur
Upptøka til maskinistútbúgvingina verður í januar 2010.

### Skipari
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

Upptøka til skipara verður í august 2009.

### Skipsførari
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipsførara verður í august 2009 og í januar 2010.

Maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

KREA · TEL 60 80 80

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg so í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

Umsóknarblað kann eisini heintast á heimasíðu okkara: **www.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

# Leiðari til Dagstovnin á Velbastað



Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til Dagstovnin á Velbastað at byrja 1. juli 2009.

### Vit bjóða
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum og har spælið fyllir nógv
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving
- tær at vera partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnarnar

### Vit vænta at tú
- ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi í einum dagstovni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan – og uttanhýsis
- ert opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum
- sært møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- ert køn/ur í teldu
- hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum

### Setanarviðurskifti
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### Umsókn
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 2. juni 2009.



### Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, deildarleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, á telefon 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**